# Nú er lagið betri á Landssjúkrahúsinum

**– Leiðslan hevur gjørt av av lurta eftir okkum, so nú eru vit samd um at líta frameftir, sigur Jákup Petersen, yvirlækni**

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Leiðslubygnaðurin á Landssjúkrahúsinum er á gravarbakkanum. Skipanin, sum nú er, við trimum stjórum, riggar ikki. Vit vilja hava eina einstreingjaða leiðslu, har tað er ein leiðari, sum einsamallur hevur evstu ábyrgdina, sigur Jákup Petersen*

– Nú er lagið betri á Landssjúkrahúsinum.

Ein fundur ímillum yvirlæknar á skurðdeildini og stjóran fyri Landssjúkrahúsið seinnapartin hósdagin hevur loyst nakrar knútar í ósemjuni ímillum yvirlæknar á skurðdeildini og leiðsluna á Landsjúkrahúsin-um.

– Vit kunnu staðfesta, at leiðslan fyri Landssjúkrahúsið hevur lurtað eftir okkum, so nú eru vit sinnaðir at líta frameftir og at taka eitt uppbyggjandi samskiftið við leiðsluna upp um framtíðina, sigur Jákup Petersen.

Hann leggur afturat, at enn eru ikki øll mál loyst. Men at leiðslan og yvirlæknarnir eru samd um at seta eina felags kós.

## Einstreingjað leiðsla á Landssjúkrahúsið

Tað, sum hann sipar til, er, at teir nú hava fingið lyftið um at leiðslubygnaðurin á Landssjúkrahúsinum verður endurskoðaður.

Og teir meta, at tað, sum liggur í kortinum í hesum sambandi, sær so mikið væl út, at teir eru positivir.

Ikki minst hefta teir seg við, at landsstýrismaðurin alment hevur nevnt møguleikan at fara fara frá tí trístreingjaðu leiðslubygnaðinum, sum nú er á Landssjúkrahúsinum og at seta ein einstreingjaðan leiðslubygnað í verk, har tað er eitt einsamalt fólk, sum hevur ovastu leiðsluna og ikki trý fólk.

– Læknarnir hava alla tíðina verið ímóti eini trístreingjaðari leiðsluni, tí vit vistu, at tað fór ikki at rigga. Og tað hevur heldur ikki riggað, tí tað hevur ført við sær, at Landssjúkrahúsið er ikki so effektivt, sum tað eigur at vera.Við trimum stjórum verður tað ov nógv maktstríð ímillum ymsar fakbólkar, har fakfelagspolitisk og faklig egináhugamál verða ov nógv dyrkað.

Læknarnir hava alla tíðina ført fram, at einasti máti at leiða sjúkrahúsið, er við at fylgja tilmælinum frá danska DIOS kanningarstovninum, sum í 1996, kannaði viðurskiftini á Landssjúkrahúsinum og mælti til eina einstreingjaða leiðslu.

Men varð ikki góðtikið og tískil endaði tað við eini neyðsemju, har ein trístreingjað leiðsla varð sett á Landssjúkrahúsið.

Jákup Petersen sigur, at læknarnir vilja hava, at ein einstreingjaður leiðslubygnaður verður settur í verk, har eitt einsamalt fólk hevur evstu ábyrgdina. Og eftir tí, sum er komið fram, eru útlit fyri at júst tað fer at henda.

Tí fara læknarnir nú upp í eitt uppbyggjandi samskiftið við leiðsluna, sum teir taka til.

– Tað er neyðugt at hava eina einstreingjaða leiðslu, fyri at sleppa undan, at hvørja ferð ein avgerð skal takast, so skulu ymiskir fakbólkar gera seg galdandi.

– Vit skulu hava eina eintýðuga leiðslu og ikki ein einsíðuga leiðslu, tí endamálið verður at sleppa undan at seráhugamál hjá ymsum fakbólkum gera seg ov nógv galdandi, sigur hann.

Læknarnir á skurðdeildini siga, at longu í 1999 metti Serlæknafelagið at tann trístreingjaða leiðslan fór at halda í mesta lagi tvey ár.

– Hon hevur nú hildið í tvey og eitt hálvt ár og stendur nú á gravarbakkanum, siga yvirlæknarnir á skurðdeildini í seinastu klaguni um leiðsluna

Teir siga eisini, at skriðan er við at leypa.

– Hendir onki verða yvirlæknarnir á skurðdeplinum noyddir til at gerðast mótspælarar. Men tað vilja vit ikki. Vit vilja verða viðspælarar og vit vilja saman við einari eintýðugari leiðslu leggja lunnar undir eitt vælvirkandi Landssjúkrahús, siga teir.

# Heini O. Heinesen sleppur ikki at vaska sær um hendurnar

**– Heina O. Heinesen og tjóðveldisflokkinum, fara at kosta føroyska skattgjaldaranum eina tíggjutals milliónaupphædd í endurgjaldi**

JÓGVAN S.

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Heini O. Heinesen skal ikki sleppa at vaska sær um hendurnar, sum ein annar Pilatus. Tað eru fyrst og fremst hann, og tjóðveldisflokkurin yvirhøvur, ið syrgdu fyri, at Jógvan S varð lagdur.

Jógvan Lutzen, reiðari á Jógvan S. vísir avgjørdur tí aftur, sum Heini O. Heinesen, formaður í landsstýrismálanevndini førir fram í Sosialinum fyrr í vikuni.

Heini O. Heinesen segði, at tað, sum landsstýrismálanevndin hevði gjørt, varð at taka eina avgerð um Jógvan S, eftir eina beinleiðis klagu frá felagnum Línuskipum.

Men hann vísti á, at tað var landsstýrismaðurin, sum hevði lagt Jógvan S og at tað avgerðina hevði landsstýrismaðurin tikið einsamallur.

Tí skuldi hann og landsstýrismálanevndin ikki hava skyldina fyri, at Jógvan S varð lagdur.

Men hesum er høvuðspersónurin í málinum, Jógvan Lutzen, reiðari á Jógvan S alt annað enn samdur í.

Hann sigur, at hetta er ein roynd hjá Heina O. Heinesen at tváa sær um hendurnar og at renna undan sínum gerðum.

– Veruleikin er, at alt føroya fólk hoyrdu Heini O. Heinesen taka støðu ímóti Jógvan S av tingsins røðarapalli, longu áðrenn málið kom til viðgerðar í landsstýrismálanevndini.

Tað gjørdi hann, tá ið hann av tingsins røðarapalli segði, at fiskiloyvið til Jógvan S var ólógligt.

Hetta førdi við sær, at ein annar limur í landsstýrismálanevndini, Jákup Mikkelsen, fanst at Heina O. Heinesen.

Hann fór upp á tingsins røðarapall og helt at Heini O. Heinesen hevði gjørt seg ógegnigan til at viðgerða málið í landsstýris-málanevndini, tí nú hevði hann longu felt fóm í málinum frammanundan.

Jógvan Lutzen vísir eisini á, at tað meiri enn einaferð varð alment frammi, at tjóðveldisflokkurin beinleiðis kravdi, at fiskiloyvið til Jógvan S. varð tikið aftur.

– Sostatt er tað ikki rætt, sum Heini O. Heinesen sigur, at avgerðin um at taka fiskiloyvið aftur, er ein avgerð, sum lands-stýrismaðurin einsamallur hevur tikið.

– Veruleikin er, at tjóðveldisflokkurin beinleiðis kravdi av samgongun, at fiskiloyvið varð tikið aftur.

Reiðarin sigur, at tí skal Heini O. Heinesen ikki sleppa at renna undan sínari ábyrgd í hesum máli við at siga, at tað er landsstýrismaðurin, sum hevur tikið fiskiloyvi aftur einsamallur.

– Tað er ikki landsstýrismálanevndin, sum er gjørd til syndabukk í hesum máli. Tað er eigararnir, manningin og húskini hjá eigarum og manning, sum eru syndabukkar í hesum málið.

– Og upphavið til alt, er landsstýrismálanevndin og teir tríggir politisku oppurtunistarnir, sum har sita, við Heina O. Heinesen á odda, væl stuðlaðir av øllum tjóðveldisflokkinum, sum kravdi, at loyvið varð tikið aftur.

Jógvan Lutzen vil ikki nærri inn á tað løgfrøðiliga í málinum, tí tað er latið upp í hendurnar á løgfrøðingarnar hjá felagnum.

Men hann ivast stórliga í løgfrøðiliga førleikanum hjá landsstýrismálanevndini.

Tað, hann sipar til, er, at aðrir aðrir løgfrøðingar eru komnir til ta niðurstøðu, at onki er at finnast at fiskiloyvinum hjá Jógvan S.

– Tað, sum landsstýrismálanevndin hevur gjørt, er at gera seg til ein dómstól og tað er var ikki endamálið við henni.

– Sostatt kann eg ikki annað enn staðfesta, at hetta er talan um politiska forfylging og onki annað. Heini O. Heinesen hevur brúkt alla sína politiska orku uppá at fáa Jógvan S lagdan.

## Endurgjald upp á tíggjutals milliónir

Jógvan Lutzen sigur, at hendan politiska forfylgingin hjá Heina O. Heinesen fer at kosta føroyska skattgjaldaranum eina upphædd upp á tíggjutals milliónir í endurgjaldi.

Hann sigur, at Jógvan S er nú lagdur og fer ikki útaftur, sum støðan er.

– Í løtuni er tað ikki í okkara hondum, hvat hendur við bátinum. Men eigararnir hava bundið seg fíggjarliga til peningastovnarnar í sambandi við Jógvan S og tí eru vit komnir í eina ringa støðu.

– Eg veit ikki, hvussu støðan einstøkum eigarum hjá Jógvan S er. Men tað er ikki óhugsandi, at onkur hevur sett húsini í veð fyri at seta pening í skipið, tí tað er hent fyrr.

Sostatt er onki at ivast í, at talan verður um eitt endurgjaldskrav upp á tíggjutals milliónir, men, hvussu stórt tað verður, er ikki roknað út enn.

Harafturat hevur Fiskimannafelagið boðað frá, at tað fer at reisa endurgjaldskrav vegna manningina.

Jógvan Lutzen leggur eisini afturat, at síðani Fiskimálaráðið broytti útrokningarháttin fyri veiðiorkuni,eru hava 33 skip fingi veiðiloyvi eftir sama roknihátti, sum Jógvan S.

– Vit fara heldur ikki at góðtaka, at bara Jógvan S skal vera tikin burturúr og missa fiskiloyvið ímeðan allir aðrir sigla. Vit fara sjálvsagt at krevja, at tað sama verður galdandi fyri øll skipini, sum er galdandi fyri Jógvan S. Og missa tey eisini fiskiloyvið er ongin ivi um, at tey eisini fara at reisa endurgjaldskrøv ímóti landskassanum.

Hann heldur eisini, at tað er óhoyrt í einum rættarsamfelag, at ein avgerð fær afturvirkandi kraft.

– Varð semja um, at framferðarhátturin hjá Fiskimálaráðnum varð skeiv, átti tað sjálvsagt at verið galdandi frameftir. Tað gjørdi tað eisini í tí málinum, sum Jørgen Niclasen misti høvdið uppá. Skipið, sum hann misti høvdið uppá, siglur framvegis, vísir Jógvan Lutzen á.



# Skuldsetingar læknanna staðiliga afturvístar

**Sjúkrahússtjórin, Poul Geert Hansen, tekur harðliga frástøðu frá óetisku og ósonnu skuldsetingunum frá yvirlæknunum á skurðdeplinum, og eftirlýsir hann heldur eina hugburðsbroyting í afturúrsiglda Landssjúkrahúsinum. Framvegis ynskir hann ikki at gera stórvegis viðmerkingar til endurskoðanir landsstýrismansins og møguligu bygnaðarbroytingarnar**

LÆKNASTRÍÐ

*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

- Um ósakligu skuldsetingarnar frá yvirlæknunum eru sannar, skuldi øll leiðslan á Landssjúkrahúsinum sitið í bolt og jarn, og er hetta so óetiskt og ómenniskjaligt, at eingin eigur at fara víðari í smálutir, sigur ein greiður sjúkrahússtjóri, Poul Geert Hansen, um ógvusligu álopini frá yvirlæknunum á leiðsluna á Landssjúkrahúsinum.

Hann vísir víðari á, at Bill Justinussen, landsstýrismaður, eisini langt síðani staðiliga hevur tikið frástøðu frá framferðarhátti læknanna í skrivi 29. august, har hann afturvísir, at leiðslan á Landssjúkrahúsinum er sek í grovu ákærunum frá yvirlæknunum.

- Um landsstýrismaðurin hevði tikið undir við læknunum, hevði øll leiðsla okkara langt síðani verið horvin, tí somikið álvarsamar eru ábreiðslurnar, sigur sjúkrahússtjórin um skuldsetingarnar, sum hann heldur vera á so lágum etiskum støði, at ein ikki eigur at fara víðari við teimum.

Poul Geert Hansen kann ikki vísa á ávísar avleiðingar av framferðarhátti yvirlæknanna, men hann metir tað hava týdning at leggja merki til, hvørjar umstøðurnar vóru kring kæruna til landsstýrismannin.

- Tað er skrivað í einum sarkastiskum tóna uppruna-liga sum munnligt skjal, har ætlanin als ikki hevur verið at viðgera tað sum skriv. Ikki fyrrenn seinni var tað latið út sum skriv, tí tað ikki var nóg væl gjøgnumarbeitt, og samanumtikið er álopið totalt langt úti, sigur ein avgjørdur Poul Geert Hansen.

## Hugburðsbroyting

Sum Poul Geert Hansen gjørdi greitt í loftmiðlunum hóskvøldið, ynskir hann ikki at gera stórvegis viðmerkingar til tær hugsanir, Bill Justinussen bar fram um endurskoðan og møguligar broytingar í bygnaðinum á økinum, og í hesum sambandi var forkvinnan í Sjúkrarøktafrøðingafelagnum heldur ikki at hitta.

- Tað er hansara borð, sum eg ikki fari at leggja meg út í nú. Eftir skrivið frá læknunum eru vit í ferð við at byggja upp aftur eitt konstruktivt samarbeiði og samskifti, og tað ræður nú um hjá okkum at hyggja frameftir, vísir Poul Geert Hansen á.

Sjúkrahússtjórin eftirlýsir eitt samskifti tvørtur um fakøki, tí tað eru 30 yvirlæknar og 570 onnur arbeiðsfólk á Landssjúkrahúsinum, og tískil mugu øll vera við í gongdini og ikki bert ein minnilutabólkur, hóast hesin bólkur ikki kann verast fyri uttan.

- Um nakað mennandi samstarv skal fáast, mugu vit fáa eina hugburðsbroyting í lag við samstarvsvilja uttan áhaldandi fokuseringina á valdsstríð á Landssjúkrahúsinum.

Poul Geert Hansen leggur eina við, at um starvsfólk á Landssjúkrahúsinum ikki vilja vera við í hugburðsbroytandi samstarvinum, verður ikki pláss fyri teimum á starvsplássinum í framtíðini.

## Afturúrsigld

Sjúkrahússtjórin vísir á, at stríðið millum yvirlæknar og sjúkrarøktarfrøðingar er eitt klassiskt afturvendandi stríð, sum grannalond okkara í stóran mun hava lagt aftur um seg, men sum enn ger seg galdandi í Føroyum.

- Á henda hátt eru vit afturúrsigld í Føroyum við áhaldandi at hava hetta maktstríð undir sjóneyku, og tískil er tíðin av álvara komin til, at vit koma víðari til frama fyri øll, slær sjúkrahússtjórin at enda fast.



*- Um ósakligu skuldsetingarnar frá yvirlæknunum eru sannar, skuldi øll leiðslan á Landssjúkrahúsinum sitið í bolt og jarn, og er hetta so óetiskt og ómenniskjaligt, at eingin eigur at fara víðari í smálutir, sigur ein greiður sjúkrahússtjóri, Poul Geert Hansen*

